# Stjórnin fingið nakað at hugsa um

**Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur givið danska forsætisráðharranum nakað at hugsa um. Hóast forsætisráðharrin ikki heldur, at landsstýrið hevur broytt kós, so vil hann ikki enn siga nakað um skiftistíð og blokkstuðul.**

FRAMTÍÐARSTØÐA FØROYA
*Magnus Dam, Keypmannahavn*

Ikki eitt orð um fýra ára skiftistíð og ikki eitt orð um føroyska ynskið at minka blokkstuðulin.

Poul Nyrup Rasmussen veit ikki enn, hvat hann skal halda um nýggju semjuna hjá landsstýrinum, sum varð fráboðað fríggjadagin.

Hóast semjan líkist nógv ætlanunum, sum landsstýrið hevur borðreitt við fleiri ferðir áður, so er aftursvarið úr Danmark ikki eins kontant – enn í øllum førum.

Orsøkin er kanska, at fólkaatkvøðurnar eru burtur, og landsstýrið vil yvirtaka málsøki eftir heimastýrislógini í fleiri ár framyvir. Ikki fyrrenn øll málsøkini eru yvirtikin, verður fólkaatkvøða um fullveldisspurningin.

### Ætlanin ikki broytt

Poul Nyrup Rasmussen hevur fleiri sagt, at partarnir annaðhvørt tosað um eina skipan innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin. Higartil hevur landsstýrið einans viljað tosað um skipanir uttanfyri ríkisfelagsskapin, og hvørja ferð hevur forsætisráðharrin tosað um eina fýra ára skiftistíð sum avleiðing av hesum.

Poul Nyrup Rasmussen tulkar signalini úr Føroyum soleiðis, at upprunaliga ætlan landsstýrisins er óbroytt.

– Prosessin heldur fram óbroytt móti suvereniteti. Tað rokni eg eisini við, at landsstýrið er samt við mær í, segði forsætisráðharrin á tíðindafundi í gjár.

Men hóast hetta, so var hendan staðfestingin ikki eins og undanfarnu ferðirnar fylgd upp av einari staðfesting av, at skiftistíðin verður fýra ár.

– Vit hyggja framvegis at útspælinum úr Føroyum, og enn kenni eg ikki uppskotið, sum ætlanin er at leggja fyri løgtingið, segði Poul Nyrup Rasmussen. Forsætisráðharrin vildi tískil ikki svara uppá, um hann heldur fast við tey fýra árini.

Á tíðindafundinum í gjár vildi Nyrup heldur ikki svara uppá spurningin, hvat hann heldur um føroyska ynskið at minka blokkstuðulin við útvið 400 milliónum.

Men hinvegin lat hann upp fyri samráðingum um tær yvirtøkurnar, sum ætlanin er at fremja.

– Hetta eru vit sinnaðir at tosa um, segði hann og undirstrikaði í hesum sambandi einaferð enn, at við yvirtøkunum fylgir eisini kostnaðurin av málsøkjunum.

### Viðgerast í Fólkatinginum

Forsætisráðharrin bíðar helst við einari endaligari útmelding, tí enn hevur uppskotið hjá landsstýrinum ikki verið viðgjørt í Føroya-nevndini hjá Fólkatinginum. Fundur verður helst í hesi ella næstu viku, og eftir tann fundin fæst helst at vita, um stjórnin og Fólkatingið halda fast um, at blokkstuðulin hvørvur eftir fýra árum.

Eisini ætlar forsætisráðharrin at taka spurningin upp í einum orðaskifti í Fólkatinginum.

– Tað er týdningarmikið, at tað er so breið semja um hendan spurningin sum gjørligt og at landsstýrið, løgtingið og Føroya fólk kenna støðuna hjá stjórnini og Fólkatinginum, segði forsætisráðharrin.

Hetta orðaskiftið verður helst ikki fyrr enn í mai.

# Ognarviðurskiftini í alivinnuni aftur á løgtingsborð

**Í framtíðini verður tað ógjørligt hjá einum felag ella einstaklingi at keypa meira enn ein fjórðing av allari tí føroysku alivinnuni**

ALIVINNA
*Magnus Dam*



*Bjarni Djurholm vil nú hava løgtingið at lóggeva um, at eingin kann eiga meira enn 25 prosent av føroysku alivinnuni. Alivinnan skal ongantíð enda á ov fáum hondum, heldur landsstýrismaðurin.*

Tað skal ongantíð henda, at føroyska alivinnan endar á útlendskum hondum, ella at eitt einstakt felag fær eina monopollíknandi støðu í føroysku alivinnuni. Hetta tykist vera breiða fatanin hjá føroyskum politikarum, sum fleiri ferðir hesi seinastu árini hava hert reglurnar um, hvussu nógv einstaklingar og útlendingar kunnu eiga í alivinnuni.

Tá tað herfyri kom fram, at stóra norska felagið Pan Fish ætlaði at keypa Havsbrún, tók kjakið um ognarviðurskiftini seg upp einaferð enn, og nú hevur Vinnumálastýrið gjørt eitt lógaruppskot, sum avmarkar samlaða partin, sum eitt einstakt felag kann eiga í alivinnuni.

Sambært lógaruppskotinum, sum Bjarni Djurholm hevur lagt fram, fer tað ikki at bera til hjá einum felag ella einstaklingi at eiga meira enn 25 prosent av samlaðu partabrøvunum í alivinnuni.

– Endamálið við uppskotinum er at forða fyri, at aliøkini í landinum, sum er tilfeingi, ið fær alt størri týdning í búskapinum, verður savnað á bert fáum hondum, stendur í fyrstu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

### 17 feløg eiga 27 loyvi

Í dag hava 17 feløg loyvi at ala í Føroyum, og hesi feløgini hava tilsamans 27 aliloyvi. Hesi loyvini skulu helst ikki savnast á nógv færri hondum, heldur landsstýrismaðurin í vinnumálum. Verða ov fáir aktørar í alivinnuni, kann hetta fáa óhepnar avleiðingar fyri búskapin og alivinnuna sjálva, heldur Bjarni Djurholm, og tí skjýtur hann upp at avmarka luttøkuna hjá einum einstakum felag og einstaklingi til 25 prosent. Lógin sigur eisini, at útlendingar kunnu ikki eiga meira enn 33 prosent í einum felag.

Landsstýrismaðurin heldur, at 25 prosent er eitt hóskandi tal. Tá hava alifyritøkurnar framhaldandi møguleika at leggja saman og styrkja seg gjøgnum økt samstarv við teimum stórdriftsfyrimunum, sum tað kann innibera, uttan tó at ein einstøk alifyritøka kemur at eiga ov stóran part av alivinnuni, sigur landsstýrismaðurin.

Uppskotið hjá Bjarna Djurholm leggur eisini upp til størri gjøgnumskygni í alivinnuni, so tað verður lættari at fylgja við ognarviðurskiftunum. Øll feløg, sum fáast við aling, skulu vera smápartafeløg ella partafeløg, og øll partabrøvini skulu vera navnapartabrøv.

Løgtingið viðgjørdi uppskotið um broytingar í alilógini fríggjadagin, og vinnunevndin skal nú viðgera málið.



# Kampval í Sambandsflokkinum

**Tað verða í minsta lagi tvey valevni til formansvalið í Sambandsflokkinum á landsfundinum, sum verður hildin í Havn fríggjardagin 23. og leygardagin 24. mars**

FORMANSVAL
*John Johannessen*



*Núverandi formaður Sambandsfloksins, Edmund Joensen, fær kapping, tá atkvøðast skal um formanssessin á landsfundinum annað vikuskiftið*

Talan verður uttan iva um kampval, tá Sambandsflokkurin á landsfundi annað vikuskiftið skal velja formann.

Skrivstovan hjá Sambandsflokkinum hevur higartil fingið boð um, at eitt valevnið stillar upp ímóti verandi formanninum, Edmundi Joensen. Hetta valevnið er løgtingskvinnan, Lisbeth L. Petersen.

Freistin at stilla upp til formansvalið er ikki úti fyrr enn fimm dagar áðrenn landsfundin. Tí er møguleiki fyri, at skrivstovan hjá Sambandsflokkinum fer at fáa boð um eitt valevni afturat. Løgtingsmaðurin, Heðin Mortensen, hevur nevniliga sagt, at hann umhugsar eisini at stilla upp til formansvalið.

### 51 atkvøður

Stillar Heðin Mortensen upp, verða tað trý valevni, ið skulu býta tær 51 atkvøðurnar, sum eru til formansvalið í Sambandsflokkinum, ímillum sín.

Formansvalið í Sambandsflokkinum er soleiðis skipað, at tey sjey valfeløgini í ávikavist Norðoyggjum, Eysturoy, Norðurstreymoy, Suðurstreymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy atkvøða við fimm atkvøðum í part. Sostatt er atkvøðutalið frá valfeløgunum tilsamans 35 atkvøður.

Síðani hevur Unga Sambandið fimm atkvøður, teir seks tinglimirnir hava eina í part, kassameistarin í flokkinum hevur eina, næstformaðurin hevur eina og at enda hava teir tríggir limirnir í starvsnevndini hjá Sambandsflokkinum eina atkvøðu í part.

Er flokkurin umboðaður á Fólkatingi, hevur fólkatingslimurin eisini eina atkvøðu, eins og landsstýrismenn hava eina atkvøðu í part, tá flokkurin er í samgongu.

# Lisbeth roynd í politikki



*Lisbeth L. Petersen stillar á landsfundinum annað vikuskifti upp ímóti Edmund Joensen sum formansvalevni*

**Lisbeth L. Petersen, sum stillar upp ímóti Edmund Joensen til formansvalið í Sambandsflokkinum, hevur verið virkin politikari síðani 1984**

FORMANSVAL
*John Johannessen*

Tað er ein royndur politikari, ið eftir áheitan frá Unga Sambandinum hevur gjørt av at stilla upp ímóti Edmundi Joensen til formansvalið í Sambandsflokkinum annað vikuskifti.

Tann 62 ára gamla Lisbeth L. Petersen úr Havn hevur verið virkin politikari síðani 1984, tá hon varð vald inn í Tórshavnar Býráð.

Lisbeth L. Petersen gjørdist beinan vegin fyrsti næstformaður í býráðnum, og eftir kommunuvalið í 1992 gjørdist hon býráðsformaður í Havn.

Á heysti í 1998 tók Lisbeth L. Petersen sætið á Fólkatingi sum varaumboð á Fólkatingi. Hon var fyrsti kvinnuligi fólkatingslimurin í Føroyum.

Lisbeth kom inn á ting í 1990 og hevur havt sæti har síðani.

Umframt mong álitisstørv í Sambandsflokkinum og øðrum felagsskapum, hevur Lisbeth L. Petersen eisini verðið annar og triðji næstformaður løgtingsins.



*Jóhannes Martin Olsen stillaði til landsfundin í 1998 upp ímóti Edmundi Joensen og mundi koppað honum úr formanssessinum*

# Edmund mundi koppað í ´98

**Jóhannes Martin Olsen mundi koppað Edmundi Joensen úr formanssessinum á landsfundinum í 1998**

FORMANSVAL
*John Johannessen*

Tá atkvøðurnar verða taldar á formansvalinum annað vikuskiftið, er tað ikki fyrstu ferð, at Edmund Joensen upplivir kapping um formanssessin í Sambandsflokkinum.

Talan var nevniliga eisini um kampval á landsfundinum beint áðrenn løgtingsvalið í 1998. Tá var tað skálamaðurin, Jóhannes Martin Olsen, ið stillaði upp ímóti Edmundi Joensen.

Hetta var ein lívligur landsfundur við hørðum orðaskifti um evnini til formansvalið. Og tá atkvøðurnar vóru talar, var greitt, at Edmund Joensen hevði varðveitt formanssessin við einum sera teprum meiriluta.

## Lions sigur nei til rúsevni

**Lions Club er farið at selja tulipanir fyri at hjálpa fólkaskúlalærarum í stíðnum móti rúsevnum millum næmingarnar**

Ungdómurin í Føroyum er í stórum vanda fyri at koma í trupulleikar av rúsdrekka og øðrum narkotiskum evnum.

Hetta ásannar Lions Club í Havn, sum afur í ár er farið undir árliga tulipantiltakið, ið skal hjálpa fólkaskúlalærarum í bardaganum móti rúsevnum.

Lions í Havn fer at sejla bukettir av tulipanum við einum skelti, har tað stendur »nei til rúsevni«. Meiningin er so, at hesar bukettir skulu standa á sjónligum stað á stovnum og heima hjá fólki.

Peningurin frá tulipansøluni fer til Lions Quest skeiðnum fyri fólkaskúlalærarum. Hetta skeiðið hevur til endamáls at gera lærararnar førar fyri at geva næmingunum lívsvirði og sjálvsálit, so teir millum annað duga at siga nei til rúsevni.

## Nógvar kvinnur í nevndina

**Unga Sambandið valdi á aðalfundi leygardagin tríggjar kvinnur í sína fimm manna nevnd**

Kvinnurnar komu veruliga til sín rætt, tá Unga Sambandið helt aðalfund leygardagin.

Tríggjar kvinnur vórðu valdar í nevndina, sum annars telur fimm fólk.

Tær tríggjar kvinnurnar í nýggju nevndini eru Maud Poulsen, Karina Fagralón og Durita Hansen. Tær eru allar nývaldar.

Finnur Jensen varð afturvaldur í nevndina, og Michael Jensen varð afturvaldur sum formaður.

Tiltakslimir í nevndini hjá Unga Sambandinum eru Sámal Petur Petersen og Jóhan Petur Johannesen.